# Upplivilsi í høgari ferð



*Sigurd Gudmundsson í Vági hevur bátin, Scorpion, sum hann brúkar í føroysku ferðavinnuni. Báturin kann sigla heilt upp í 63 míl*

Nógvir føroyingar eru farnir at bjóða seg fram í ferðavinnuni í Føroyum seinastu árini, og ein teirra er Sigurd Gudmundsson í Vági. Hann hevur tveir bátar, har tann eini, Scorpion, er góðkendur til føroysku ferðavinnuna.

Tað er tó nakað serligt við bátunum hjá Sigurd. Tann størri, sum er góðkendur til føroysku ferðavinnuna, kann nevniliga sigla upp í 63 míl, um hann hevur tveir persónar við, og er báturin fullur, so kann hann sigla á leið 52-53 míl, so gestirnir hjá Sigurdi kunnu fá eitt upplivilsi í høgari ferð, um teimum lystir.

Sigurd byrjaði at sigla við bátunum í fjør, og tað hevur gingið hampiliga væl.

- Fyrsta árið hjá mær gekk hampiliga væl, men eg vóni, at árið í ár verður enn betri. Eg geri mest túrar í Suðuroynni, og ofta vilja fólk sleppa til bjørgini vestantil á oynni. Eg geri tó eisini túrar kring alt landið, men veðrið í landinum hevur sjálvandi rættiliga nógv at siga í hesi vinnuni, sigur Sigurd Gudmundsson.

Sigurd sigldi m.a. fólk út á Ovastevnu í fjør. Her brúkti hann í miðal tríggjar og ein hálvan minutt fyri hvønn túr, og hetta dámdi fólki avbera væl. Hann ætlar aftur í ár at sigla fólk út á Ovastevnu, og til síðst leggur hann afturat, at fólk altíð kunnu koma suður at royna bátin ella standa á vatnski. Hann tekur bæði smærri og stórar bólkar.



















